# Einki er so gott sum før

**– Eg dugi ikki at silja, at føroyingar ikki eta meiri av tí. – Men hinvegin. Hví skal ein keypa ein føroyskan neytafjórðing, tá handlarnir eru á tremur av tí bíliga útlendska kjøtinum?, sigur Jørmund Zachariasen, bóndi í Hesti**

*- Hevur ein ikki áhuga fyri neytahaldi, kann alt gera tað sama. Fortjenastan er einki at tosa um, sigur Jørmundur Zachariasen*



BÓNDI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hestur:** – Eg veit ikki hví, men tann eini kálvurin beljar so nógv. Eisini tá fólk gongur uttanfyri!

Vit eru tveireinir á veg móti fjósinum hjá Jørmundi har suðuri í bygdini.

Hestmenn hava altíð havt orð á sær fyri at hava verið góðir fiskimenn. Men landbúnaðurin hevur eisini havt sín stóra leiklut í bygdarlívinum.

Hóast ein ávís afturgongd hevur verið í landbúnaðinum í síni heild, hevur Jørmund kortini gjørt sítt til at halda lív í landbúnaðinum, umenn tað er í minni mát enn fyri 30 árum síðani.

Fyrr vóru nógv kríatúr í fjósinum, men í dag eru tey ikki eins mong og tá: Tvær kýr hvør við sínum kálvi, ein tarvur og trý ungneyt.

– Enn er alt inni. Eg vænti tó, at tey fara út um ikki so langa tíð, tá grasið er komið fyri seg, sigur hann.

## Gjøgnumhugsað avgerð

Jørmund Zachariasen var sum so mangur annar unglingi í Hesti til skips á ungum árum.

Hann var á sjónum í nøkur ár, men gjørdist síðani bóndi og róði eisini út.

– Hetta var vanligt tá, sigur Jørmund.

Hann bygdi fjósið har suðuri í bygdini í 1974, og hevði um hetta mundið fleiri neyt enn hann hevur í dag.

Í fjósinum er rúm fyri íalt 10 neytum, men hann hevði kortini ongantíð havt fleiri enn átta.

Vitjar tú fjósið í dag eru munandi færri neyt enn áður. So líðandi hevur hann minkað munandi um talið av kríatúrum.

At hann gavst við neytahaldinum fyri nøkrum árum síðani kom mestsum av sær sjálvum. Tað hendi ikki soleiðis í einum og var heldur ikki merkt av dramatikki.

– Avgerðin um at gevast var væl gjøgnumhugsað, sigur Jørmund.

– Kreftirnar vóru snøgt sagt farnar at ganga undan!

## Áhugi – ikki fortjenasta

Tá tosað verður um føroyskan landbúnað hoyrir ein ofta sagt, at hetta er ein tung vinna, har avkastið ikki er so stórt.

Hesum er Jørmundur eisini samdur í. Tí sum hann sigur:

– Neytahald, – tað havi eg havt av áhuga. Var tað ikki fyri áhugan, hevði eg als ikki fingist við tað.

Hann vísir til, at hevur onkur eitthvørt tímalønt arbeiði á landi, so kann viðkomandi saktans gera hetta, hóast hugurin kanska ikki altíð er til staðar.

Men tá talan er um neytahald er øðrvísi:

– Hetta MÁ gerast av áhuga. Tað er so ikki fyri fortjenastina at eg bóndist, sigur Jørmundur avgjørdur.

Umframt neytini hevur hann eitt áttamannafar, sum hann brúkar av og á. Annars ansar hann elverkinum í oynni.

## Gott kjøt

Hjá einum bónda á bygd er spurningurin altíð, hvussu hann einfalt og lætt kann sleppa av við bæði mjólkina og ikki minst kjøtið.

Fyrr var møguleiki at lata Sláturvirkið í Hósvík fletta neytini, men hesin møguleikin er ikki til longur.

Jørmund hevur tí verið noyddur at standa sjálvur fyri søluni av góðum kjøti úr Hesti.

– Eg plagdi at lýsa í bløðunum við kjøtinum, men tað var ikki altíð at eg slapp av við alt, sigur hann.

Dygdina á kjøtinum ber hann kortini ongan ótta fyri, tí tey føroysku neytini eru væl fyri.

– Tey eru væl fóðrað, og tí er kjøtið sera gott!

## Eta ov sjáldan døgurða

Sum ein ið vil føroyska landbúnaðinum væl er Jørmund ikki í iva um, at føroyingar áttu at etið nógv meiri føroyskt framleitt neytakjøt.

– Soleiðis sum eg síggi uppá tað, so eru tað so fá sum eta døgurða heima í dag, kanska bert í vikuskiftunum.

Hinvegin so skilir hann væl, at fólk velja tað føroyska kjøtið frá, og heldur keypa tað útlendska. Tað sær jú so lekkurt út, har tað liggur í handilsdiskunum. Og so er tað eisini væl bíligari enn okkara.

– Eg hevði so ynskt, at handlar og fólk keyptu tað føroyska. Men hvat, – tá teir fáa tað bíligari úr útlandinum, hvat er so at gera við tað?!, sigur Jørmundur.

# Ætla at byggja raðhús

**Leirvík:** Kommunan bjóðar nú áhugaðum at byggja raðhús á tveimum økjum í kommununi. Hvørt økið er góðar 1400 fermetrar til støddar og er kostnaðurin 150 kr. fyri fermeturin.

Upplýst verður, at økini hava verið byggibúgvin í fleiri ár. Haraftrat er vegur gjørdur og allar installasjónir liggja inn á økini.

Ætlanin er at byggja hesi raðhúsini, soleiðis at tey, eins og lendið gevur møguleika fyri, skulu fella væl inn í landslagið.

Enn er ikki greitt, hvussu vegaføringin verður í bygdini við Norðoyatunnilin, og tí hava myndugleikarnir noktað kommununi at seta ætlanina í verk.

Tey, ið hava áhuga at byggja hesi raðhúsini, skulu lata tilboð síni inn fyri 14. august í ár, verður upplýst á heimasíðuni hjá Leirvíkar kommunu.

**sb.**

# Barnalegurnar í summar byrjaðar

**Zarepta/Nesvík:** Nú summarfrítíðin hjá skúlunum er byrjað, merkir tað samstundis at summarlegurnar á báðum teimum stóru leguhúsunum byrja.

Sunnukvøldið byrjaði fyrsta ungdóms- og barnalegan í Zarepta í Vatnsoyrum og varir henda fram til leygardagin.

Í leguhúsinum í Nesvík byrjaði ein lega fríggjakvøldið, tá næmingar í 6. og 7. flokki fóru á legu. Sama dag byrjaði eisini ein lega fyri næmingar í 2. til 4. flokki í Sørvágs skúla.

Á báðum støðum halda legurnar fram alt summarið, har í túsundatali av børnum fara at leita sær.

**sb.**




*Hvørt einasta ár luttaka túsundtals børn og ung á summarlegum í Zarepta*